| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 14. desember 2011 |
| Býráðsfundur nr. | 13/2011 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2011 tann 14. desember kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 08. Og 12. desember 2011 um innkalling til fundar.
Fundurin er sambært skrivi, dagfestum 12. desember 2011 fluttur 1 dag fram frá 15. til 14. desember.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Jann Toftegaard
Gudny Vang
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Sonni á Horni

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 51/2011.**

**Ásetan av fundardøgum býráðsins fyri 2012.**

Fuglafjarðar býráð hevur móttikið skriv frá borgarstjóranum, dagfest 08. Desember 2011, hvar hann mælir til, at føstu almennu býráðsfundirnir fyri 2012 verða hildnir niðanfyri standandi hósdagar kl. 16.30 í býráðssalinum:
26. januar, 23. februar, 29. mars, 26. apríl, 31. mai, 21. juni, 30. august, 27. september, 25. oktober, 29. november og 13. desember.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við uppskotinum frá borgarstjóranum til almennu býráðsfundirnar fyri árið 2012. (8-0).

**Mál nr. 52/2011.**

**Mál viðvíkjandi vali av limi í ferðslunevndina.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið teldupost frá Maluni Kjærbo, dagfestur 26. september 2011, hvar boðað verður býráðnum frá, at hon av persónligum orsøkum ynskja at taka tygum úr ferðslunevndini pr. 01. oktober 2011, har hon eisini hevur verið forkvinna síðan 01. januar 2009.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 01. desember 2011 og varð samtykt varð at taka umsókn hennara til eftirtektar, somuleiðis sum býráðið takkar henni fyri tíðina, nýtt til kommunala nevndararbeiðið. Henda avgerð er fráboðað henni við skrivi, dagfestum 05. desember 2011.

Val av nýggjum nevndarlimi í hennara stað varð útsett og kemur at verða sett á dagskrá til komandi býráðsfund.

**Avgerð:**
Samtykt varð at velja Ruth Hansen sum lim í ferðslunevndina restina av inniverandi valskeiði, t.v.s. fram til 31. desember 2012.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 17.00.

Dánjal Vang

Jann Toftegaard

Gudny Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus Midjord

Sonni á Horni

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen